# Hálvir sannleikar og heilar lygnir í Dimmalætting

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



**»Skandalusøgan« á forsíðuni í Dimmalætting í síðstu viku er enn eitt dømi um, at tíðindaredaktiónin á blaðnum hevur sett sær fyri at undirgrava borgarstjóran í Havn**

Tíðindabløð eru ein vøra, sum skal seljast, og undirritaði er enn eina ferð vorðin ein forsíðusøga, sum kann selja Dimmalætting.

Fleiri eru kanska vitandi um, at undirritaði í eina tíð ikki hevur viljað havt nakað samskifti við blaðfólk á Dimmalætting. Orsøkin er, at undirritaði í fleiri umførum hevur fingið eina órímiliga viðgerð og viðferð í blaðnum.

Hetta er sjálvandi ikki fallið í serliga góða jørð á Dimmalætting, og tað er helst orsøkin til, at blaðfólk á Dimmalætting leita við ljós og lykt eftir málum, ið kunnu seta borgarstjóran í eitt keðiligt alment ljós.

Júst hetta – at tíðindaredaktiónin á blaðnum er vorðin súr – er helst orsøkin til, at borgarstjórin enn eina ferð er úthongdur á forsíðuni og inni í blaðnum í gjár, 10. apríl 2008.

**Keldukritikkur úr niðastu skuffu**

Hesaferð skal blaðið seljast uppá, at "Heðin misnýtir skattapengar". Hetta er ein yvirskrift, ið ivaleyst selur nógv bløð.

Dimmalætting torir neyvan sjálv at standa aftan fyri yvirskriftina, og tí er talan um eitt sitat – ikki frá einari óheftari keldu, nei, frá býráðsliminum Jan Christiansen, ið er ein av politisku mótstøðumonnunum hjá undirritaða.

Hetta er vorðið sum journalistikkur og keldukritikkur. Ring líka til Jan Christiansen og vita, um hann kann vera stumtænarin, ið yvirskriftin kann hangast uppá. Jú, tað ber væl til, síggja vit.

Fyri tey, sum ikki vita tað, so var Jan Christiansen borgarstjóri í Tórshavnar Kommunu beint undan mær. Hann hevur í eitt heilt valskeið verið fordyndaður inn á meg, tí borgarstjórasessin glapp honum av hondum. So tað er ikki undarligt, at Jan Christiansen vil leggja navn til hesa saftigu yvirskriftina.

**Heila lygnin**

Hvat er tað so, ið Jan Christiansen meinar við? Jú hann heldur tað vera "óluksáliga grovt", at borgarstjórin hevur keypt eksterna fjølmiðlaráðgeving upp á rokningina hjá kommununi.

Eisini sigur Jan Christiansen, at hetta er "óhoyrt", og at "býráðið ongantíð brúkti eina krónu upp á fjølmiðlaráðgeving, meðan hann var borgarstjóri".

Javel. Hetta er jú greið tala frá fyrrverandi borgarstjóranum, sum enntá ætlar at taka hetta upp í fíggjarnevndini hjá býráðnum.

Trupulleikin er bara, at Jan Christiansen sigur ósatt. Tað kann skjalprógvast, at býráðið í borgarstjóratíðini hjá Jan Christiansen eisini keypti eksterna fjølmiðlaráðgeving. Hetta er sjálvandi nakað, sum Jan Christiansen ikki hevur nakra interessu í at siga nakað um.

Tað, sum kortini undrar, er, at Dimmalætting hevur somu interessu sum Jan Christiansen í at mistonkiligera borgarstjóran. Hví hevur Dimmalætting ikki kannað málið ordiliga og biðið um innlit í roknskaparskjøl frá tíðini, tá Jan Christiansen var borgarstjóri?

Kann tað hugsast, at Dimmalætting hevur ein sjálvstøðugan áhuga í at lata vera við at gera journalistiska arbeiðið til lýtar? Eg giti, at tað er so. Undirritaði er jú ikki tann mest populeri persónurin á tíðindaredaktiónini á Dimmalætting.

**Púra vanligt at keypa eksterna ráðgeving**

Hetta, at ekstern ráðgeving verður keypt, er púra vanligt. Tórshavnar Kommuna hevur, alt tað eg veit um, keypt eksterna ekspertisu av øllum møguligum slag.

Tak til dømis løgfrøðiligar spurningar. Er nakað óvanligt í, at kommunan keypir sær ekspertisu á hesum øki? Seta Dimmalætting ella Jan Christiansen spurnartekin við, at skattaborgarar rinda fyri eksterna løgfrøðiliga ráðgeving? Nei, tí tað er púra vanligt.

Tak til dømis byggiteknískar spurningar. Er nakað odiøst í, at kommunan vendir sær til ekspertar á hesum øki og keypir sær ráðgeving? Nei. Hví? Jú tí tað er púra vanligt.

Tak til dømis spurningar av roknskapartekniskum slag. Hevur Dimmalætting nakrantíð interesserað seg fyri, um kommunan hevur goldið einum revisori ella skattakønum fyri ráðgeving? Ikki tað, eg veit um.

Nú er spurningurin komin til samskiftisfakliga ráðgeving. Nú er knappliga púra galið, at kommunan leitar sær eksterna ekspertisu? Hví? Møguliga tí, at hetta ikki hevur verið so øðiliga vanligt. Men er tað ein rímilig orsøk til nærmast at kriminalisera innkeypið av ekspertisu og ráðgeving á hesum øki? Eg haldi ikki.

Í veruleikanum er ongin munur á, um kommunan ella borgarstjórin keypir eksterna ráðgeving frá einum løgfrøðingi, arkitekti, revisori ella samskiftisráðgeva. Talan er um professionella ráðgeving á ymsum økjum, og ráðgevingin er neyðug viðhvørt, hóast kommunan hevur bæði løgfrøðingar, arkitektar, roknskaparfólk og samskiftisráðgevar í starvi.

**Gerið heimaarbeiðið ordiligt**

Mín áheitan á Jan Christiansen er, at maðurin gevst við síni dupultmoralsku hetz og serliga, at hann gevst at siga ósatt.

At koma við nakrari áheitanin á Dimmalætting er helst púra til fánýtis.

Dimmalætting hevur við sonevnda "journalistikkinum" í síðstu viku prógvað, at blaðið rennur politisk ørindi fyri mótstøðufólk hjá undirritaða. Málið er at undirgrava mín persón.

Lesarar hjá Dimmalætting duga helst at síggja, at tað, sum stendur í blaðnum, eru hálvir sannleikar og heilar lygnir.

Fótbóltskappingin







# Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN



**20. partur**

Dánielsbók byrjar ikki, sum hinar tríggjar, við at siga, at Gud hevur opinberað seg fyri Dániel og biður hann tala. Haraftur-ímóti byrjar bókin við at siga frá um, tá ið Nebukadnezar bábelskongur herleiðir Jójakim, kongin í Juda og saman við honum nakrar ungar dreingir. Hesir dreingir skuldu lærast upp í bókmentum og tungumáli kaldeara. Millum hesar vóru Dániel og vinmenn hansara. Dániel og vinmenn hansara vóru gudóttandi ungir dreingir, sum hildu fast við lógina og tað, sum teir vóru upplærdir í heima í Judalandi. Harrin var við teimum, og eftir lokna skúlatíð gjørdust teir tænarar hjá konginum og vóru roknaðir uppí vísmenninar í Bábel.

Men so komu royndirnar. Nebukadnezar hevur dreym, og tá ið hann vaknar, veit hann ikki, hvat hann hevur droymt og vil hava vísmenninar at siga sær dreymin og týða hann. Hesa uppgávuna megna teir ikki, kongurin gerst ovursintur og gevur boð um, at teir skulu drepa vísmenninar. Tá ið Dániel hoyrir hetta, søkir hann sær hjálp hjá Gudi, og nú kemur honum til góðar, at hann hevur eitt dagligt samfelag við tann livandi Gud. Hann heitir á vinmenninar at biðja til Gud saman við sær, so at teir ikki verða dripnir. Gud svarar, hann opinberar fyri Dániel dreymin, sum Nebukadnezar hevur havt, og sigur honum eisini, hvussu hann skal týðast, og bæði hann, vinmenn hansara og hinir vísmenninir verða spardir.

Her er ein so stórur lærdómur, í hvussu tað loysir seg at óttast Gud. Dániel og vinmenninir høvdu, stutt sagt, verðið dripnir mitt í lívsins besta blóma, um teir ikki høvdu Gud at farið til. Vit vita ikki, hvat man liggja á leið okkara, tí er gott at hava Harran sum álit sítt í hesum ótrygga lívi, har alt kann broytast eftir einum sekundi.

Men hvat var hetta fyri ein dreymur, Nebukadnezar hevði havt?

Hetta var eingin vanligur týdningarleysur dreymur, alt annað. Kongurin sá í dreyminum eina stóra standmynd, sum var øðilig at síggja. Høvdið var úr fínum gulli, bróstið og armarnir vóru av silvuri, búkurin og lendarnar av kopari, beinini av jarni, og føturnir fyri ein part av jarni og fyri ein part av leiri. Síðani hendi tað, at ein steinur var rivin leysur, tó ikki við hondum, og hann rakti myndina á føturnar – sum vóru av jarni og leiri, og hon soraðist sundur, og einki sást aftur til hana, men steinurin varð til stórt fjall, ið fylti upp alla jørðina.

Týdningurin av dreyminum hevði ikki bert við Nebukadnezar at gera, men hevur við okkum øll at gera, meg og teg eisini. Úleggingin, sum Dániel segði Nebukadnezar kongi, er um hendingarnar á jørðini líka frá døgum Nebukadnezars og heilt fram til okkara tíð og longur enn, heilt fram til endans tíð, inn í ævinleikan. Dániel sigur nágreiniliga frá teimum fýra heimsríkjunum, sum skuldu koma, ja Bábelsríkið sjálvt var eitt av teimum. Tá ið vit nú lesa søguna, síggja vit, hvussu hetta er gingið út, og vit síggja eisini, hvussu tað, sum enn er frammanfyri, ger seg til, júst so sum Dánielsbók sigur frá. Eg komi nærri inn á hetta næstu ferð.

**Framhald**